

Mynd: PGS

# Seismikkfelagið PGS skal at spara 1,7 milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

27.07.2015 - 07:25

Oljan.fo

Seismikkfyritøkan Petroleum Geo-Services (PGS) almannakunngjørdi hósdagin sítt úrslit fyri annan ársfjórðing í ár. Fyritøkan hevur í ársfjórðinginum havt eitt tap uppá 400 milliónir krónur, samanborið við 235 milliónir í yvirskoti sama tíðarskeið í fjør.

Orsøkirnar til versnandi úrslitið er at marknaðurin er versnaður, skip eru løgd og tey skipini sum eru í arbeiði eru ikki brúkt í so stóran mun sum fyritøkan gjarna vildi havt tey.

Hinvegsin, so er úrslitið 55 milliónir betri enn ein hevði mett frammanundan, skrivar Dagens Næringsliv.

Stjórin í PGS. Jon Erik Reinhardsen, roknar við at rakstrarúrslitið fyri 2015 kemur at liggja millum 3,8 og 4,8 milliardir krónur í 2015.

Hann skrivar í frágreiðing síni til roniskapin at fyritøkan er væl fyrireika til at taka ímóti teimum avbjóðingunum sum eru í verandi marknaði.

30. juni í ár hevði PGS avtalur klárar fyri knappar 1,8 milliardir krónur, samanborið við 3,8 milliardir krónur í fjør.

PGS hevur avtalur fyri 95 prosent av tíðini hjá sínum flota hendan ársfjórðingin, í fjórða ársfjórðingi eru avtalur gjørdar fyri 65 prosent av tíðini. Í 2016 eru fyribils avtalur gjørdar fyri 30 prosent av arbeiðsorkuni hjá PGS-skipunum í fyrsta ársfjórðingi, og fimm prosent í øðrum ársfjórðingi.

Í mai boðaði PGS frá at minst 150 starvsfólk, harav eini 50 ráðgevarar, noyðast at gevast í fyritøkuni. Orsøkin vóru innsparingar.

Reinhardsen sigur at tey eru frammanfyri spariætlanina í tíð, og at tey hava sum mál at spara minst 1,7 milliardir afturat í 2015. Sum skilst skulu nýggju sparingarnar ikki raka starvsfólkahópin, men finnast aðrastaðni í rakstrinum.

Thor í Hósvík hevur avtalur um at PGS skal brúka skip hjá teimum í samband
við seismikkuppgávur